# Sjúkrakassin eigur at verða goldin gjøgnum skattin



INGRID S. HENRIKSEN
limur í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Í grein í Dimmalætting hin 1. juni 2007 varð sagt frá, at Landsstýrið á Ólavsøku 2007 ætlaði at broyta núverandi sjúkrakassaskipan við verandi 11 sjúkrakøssum til 1 landsfevnandi sjúkrakassa. Sagt varð frá, at politisku flokkarnir ikki vóru á einum máli um, hvussu fíggingin av komandi sjúkrakassaskipan skuldi verða. Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin søgdu, at sjúkrakassagjaldið skuldi gjaldast yvir skattin, meðan onkur flokkur ikki hevði tikið endaliga støðu til spurningin.

Í nevndu grein varð sagt frá, at samlaðu inngjøldini til sjúkrakassarnar vóru uml. 89 mó. kr. í 2005.

**Núverandi sjúkrakassaskipan vendir tunga endan niðureftir**

Sjúkrakassagjaldið eigur ikki framhaldandi at verða goldið sum ein ávís føst krónuupphædd, ið er eins høg hjá øllum inntøkubólkum. Tað er ikki rímuligt at láglønir arbeiðarar, fólka- og fyritíðarpensjónistar, arbeiðsleys, lesandi v.fl., skulu gjalda líka nógv í sjúkrakassagjaldi sum fólk, ið hava høgar inntøkur.

Landsins myndugleikar eiga at geva gætur, at rættiliga nógvir føroyingar hava lága løn. Yvirlit hjá Hagstovu Føroya vísir, at í 2004 vóru í alt uml. 12.000 persónar í Føroyum lágløntir – t.v.s. høvdu ársinntøkur, ið lógu millum 75.000 kr. og 200.000 kr. Fólk við lágum inntøkum høvdu fingið ein tiltrongdan fíggjarligan lætta, um sjúkrakassagjaldið varð fíggjað gjøgnum landsskattin. Fíggingin av sjúkrakassanum hevði á henda hátt vent sosialt rætt og hevði verið við til at smalka gjónna millum høgtlønt og lágtlønt.

**Fígging av nýggju sjúkrakassaskipanini**

Skattalættin, ið samgongan ætlar at lata fyri árið 2008 kr. - sum er í alt uml. 85 mió. kr. fer ætlandi enn einaferð í serligan mun til tey við høgum lønum. Hesin skattalætti, ið vendir sosialt skeivt, eigur at verða strikaður. Heldur politiski meirilutin framhaldandi, at landskassin hevur ráð at lata fíggjarligar lættar í 2008, eigur fíggjarligur lætti í staðin at verða latin Føroya fólki sum avtøka av núverandi sjúkrakassagjaldi. – hetta soleiðis at sjúkrakassagjaldið frá og við 2008 verður goldið yvir landsskattin. Verður sjúkrakassin fíggjaður yvir landsskattin at rokna frá ársbyrjan 2008, fáa allir borgarar í landinum fíggjarligan lætta – ein fíggjarligan lætta sum hevði munað mest hjá teimum mongu lágløntu, ið sjálvsagt hava mest brúk fyri almennum fíggjarligum lættum.

# Strandaðu í Fuglafirði á nátt

Fríggjakvøldið 16. november 2007 vóru vit nakrar gentur í aldrinum 15-19 ár úr Havn, ið fóru á konsert í Mentunarhúsinum í Fuglafirði. Vit høvdu teknað okkum at koyra við bussi úr Havn til Fuglafjarðar og heimaftur – hildu vit. Tá vit spurdu busssjafførin, nær hann koyrdi heimaftur, svaraði hann, at hann koyrdi aftur til Havnar aftan á konsertina, men at hann ikki visti ikki heilt, nær hon var liðug.

Vit fóru so glaðar til konsert og hugnaðu okkum óført, men um eitt tíðina, tá konsertin var liðug, og vit ætlaðu okkum heim, var eingin bussur at síggja nakrastaðni. Vit spurdu fyriskiparararnar av konsertini, um tey vistu nakað um nakran buss til Havnar, men tað vistu tey ikki. Tey ringdu til sama mann, sum vit høvdu koyrt við – tað nummarið, ið stóð á plakatini fyri konsertina - men hann svaraði, at hann koyrdi ikki aftur til Havnar í kvøld.

Har stóðu vit so, nakrar gentur, sum skuldu til Havnar, við ongum farti heim. Hvat skuldu vit gera mitt á nátt í Fuglafirði við ongum, sum vit kendu í nánd at sova hjá? Vit vóru strandaðar!

Tíbetur var ein av vaktunum, ið skuldi til Havnar hetta sama kvøldið, so vit sluppu heim við honum (takk fyri túrin heim ), men vit eru tó samdar um, at tað er ótrúliga vánaligt og ótrygt, at ein ikki kann hava álit á, at bussurin koyrir heim aftur aftan á konsertina. Hvussu kunnu foreldur lata børn síni fara á konsertir o. a. av bygd, tá viðurskiftini eru so illa skipað? Vit fara í hvussu so er at hugsa okkum væl um, áðrenn vit fara av bygdini á konsert aftur, og tað er spell, tí henda konsertin í Mentunarhúsinum var í øllum førum rættiliga góð.

Vit eru ikki heilt vísar í, hvør hevur ábyrgdina av hesum, men í øllum førum má størri ábyrgd vísast, tá koyrt verður við ungum fólki.

**Jóhanna Magnusardóttir, Sigrið Mikkjalsdóttir, Marin Búadóttir og Birita Danielsen**

# Bilar ella blæur – seljarin ræður



Val

PETUR Í GONG
Tj'ðveldi

**Í Føroyum skulu vit hava nøktandi brúkaralógir, ið verja okkum sum brúkarar og tryggja okkum okkara sjálvsagda rætt í brúkaramálum**

Keypir tú eina vøru ella tænastu, sum ikki er í lagi, er tað seljarin einsamallur, ið stendur til svars fyri tær sum brúkara. Ongastaðni kann seljarin geva nøkrum øðrum skyldina. Ongastaðni uttan í Føroyum!

Vit hoyrdu í Degi og Viku herfyri um sjónvarpshyggjara í Streymnesi, ið ikki var nøgdur við tænastuna frá Kringvarpi Føroya, tí har bara kavarok á skíggjanum. Hyggjarin kærir sína neyð fyri Kringvarpinum og boðar frá, at hann ikki vildi gjalda, tí hann fær ikki røttu tænastuna.

Men sum so mangan í føroyskum brúkaramálum, so skákar seljarin sær undan ábyrgdini, tí Kringvarpið gav bara eini aðrari fyritøku skyldina – í hesum føri Føroya Tele – og soleiðis syrgdi Kringvarpið fyri, at hyggjarin varð sendur í æviga ringrás við síni kæru, eins og fleiri undan honum.

Hetta er sjálvandi bæði órímiligt og púra burturvið! Tí keypir tú eina vøru ella tænastu, sum ikki er í lagi, so er tað seljarin – í hesum føri Kringarp Føroya – sum skal tryggja tær góðskuna. Tað er líka mikið, hvaðan seljarin fær sína vøru, ella hvørja avtalu, hann hevur við annan part. Hann skal veita tær tað, tú rindar fyri, ella geva tær peningin aftur.

Men soleiðis er ikki í Føroyum, og tíðin er komin at bøta um hetta óskilið. Tíðin er komin, at vit brúkarar fáa neyðugu lóggávuna, ið skal verja og tryggja okkum okkara sjálvsagda rætt í brúkaramálum.

Sum formaður í Brúkarasamtakinum í fleiri ár havi eg vitanina og royndirnar at vinna okkum hesar sømdir. Eg eri rætti maðurin á tingi at arbeiða fyri hesum máli, sum viðkemur tær og mær – ja, sum viðkemur okkum øllum í gerandisdegi okkara.

- vel ein mann, sum torir

# Góður urtagarðsmaður fer nú til verka



Val

KAJ LEO JOHANNSESEN
formaður í Sambandsflokkinum

Pressan er ein fantastiska týðandi partur av okkara demokratisku samfelagsskipan. Stundum hevur hetta týdningarmikla organið tó dekan og góðan hug at dyrka konfliktir, sum pressan fyri stóran part livir av at lýsa. Onkuntíð eisini konfliktir, ið ikki eru har.

Tak til dømis hetta fólkatingsvalið, ið júst er farið afturum.

Ikki tykkum at siga: í Sambandsflokkinum eru vit Himmals fegin um úrslitið. Eitt av okkara valevnum vann annan sessin, og nú hava vit fingið enn ein góðan pall at reka okkara politikk á. Nú ber endiliga til at fáa javnvág í aftur tað, sum í Fólkatinginum frættist úr Føroyum og um Føroyar.

Ríkisfelagsskapurin, ið vit hava sammett við ein urtagarð, hevur aftur fingið ein urtagarðsmann, ið veruliga hevur áhuga fyri at fáa gróður í aftur garðin.

Hetta valið fall so mikið væl út fyri okkara flokk, at vit eru komin í eina lyklastøðu. Tað er okkara fólkatingsmaður, ið tryggjar, at Fogh-stjórnin heldur fram. Okkara flokkur er ikki hann, ið skrykkir teppið undan einari borgarligari stjórn.

Kundi meira enn so hent, at júst Edmund Joensen fer at vera landi sínum eitt gott og virðismikið umboð og stjórnini í Keypmannahavn ein góður samstarvsfelagi.

Eisini hetta fegnast vit í flokkinum um.

Men tað er sjálvandi ikki nøkur konfliktsøga, ið pressan hevur nakran sum helst áhuga fyri. Tveir og ein hálvan minuttir eftir, at góða og positiva úrslitið av valinum varð greitt, ráddi um at koma við tí negativa og keðiliga. Nú var tað bráddliga ein trupulleiki, at Edmund Joensen og ikki Kaj Leo Johannesen varð kosin fólkatingsmaður.

Álvaratos tit, sum stýra vinklunum í pressuni. Eingin tykkara fær formannin í Sambandsflokkinum at harmast um, at flokkurin hevur havt eitt kanónval. Í okkara flokki snýr tað seg fyrst og fremst um politikkin. Alt annað – eisini persónar og nøvn – er sekundert.

Í tí sama positiva andanum, sum hetta lesarabræv er skrivað, takki eg øllum tykkum, sum valdu Sambandsflokkin á fólkatingsvalinum. Hvør einasta sambandsatkvøða fer nú at vinna ávirkan og virka fyri úrslitum. Eisini ein hjartans tøkk til tykkum mongu, sum á onkran hátt hjálptu flokkinum til hetta úrslitið. Valevnini fáa eisini eina inniliga tøkk fyri innsatsin.

Seinasta og størsta blóman fer til nýggja urtagarðsmannin. Tillukku Edmund, og góðan arbeiðshug.

Lesið Sosialin - so eru tit við